# Vísa ungum úr øðrum norðurlondum Føroyar

*Í hesum døgum er norðurlendsk ítróttar- og mentanarstevna í Føroyum, har ung úr øllum hinum Norðurlondunum eru við*



*Ítróttar og mentanarstevnan í Føroyum varð sett á Tvøroyri sunnudagin. Í morgin gongur leiðin til Havnar, har stevnan heldur fram, til hon endar fríggjakvøldið. um 50 ung úr øllum Norðurlondum eru við á stevnuni.*

ÁKI BERTHOLDSEN

Í hesum døgum er ein stór, norðurlendsk ítróttar- og mentanarstevna í Føroyum.

Tað eru ung úr øllum hinum norðurlondum, sum nú hava sett hvørjum øðrum stevnu í Føroyum.

Tilsamans eru seks ung í aldrinum 16-18 ár við á stevnuni, saman við tveimum leiðarum úr hvørjum landi.

Stevnan byrjaði á Tvøroyri sunnudagin, og har heldur hon fram, til í morgin, tá ið luttakararnir stevna til Havnar, har hon heldur fram á Hotel Føroyum.

Stevnan endar fríggjakvøldið og leygarmorgunin fara tey so avstað aftur við Atlantsflog, sum stevnuleiðslan sigur, hevur útvegað sera bíligar ferðaseðlar.

Á Tvøroyri er stevnan í ítróttarhøllin og skúlanum í Trongisvági, sum kommunan hevur latið teimum til stevnuna fyri onki.

Á stevnuni skulu ungdómarnir úr hvørjum landi greiða hinum luttakarunum frá um heimlandið og mentanina, tey eru vaksin upp við.

Men harumframt er hetta eitt frálíkt høvi til at vísa ungum úr øllum Norðurlondum, hvussu Føroyar eru og at vísa teimum tað einastandandi natúruna, sum her er, sigur Ítróttarsambandið.

Somuleiðis er hetta eitt frálíkt høvi at vísa teimum, hvørjar møguleikar, vit hava í Føroyum at íðka ítrótt, tí tey, sum eru við á stevnuni, eru framtíðar ítróttarleiðarar.

Tað var Dan Nielsen, settur býráðsformaður á Tvøroyri, sum setti stevnuna og í sama viðfangi greiddi hann luttakarunum eitt sindur frá um Tvøroyri og Suðuroynni.

Aftaná greiddi Sverri Midjord, varaforseti í ÍSF, leyðsliga frá um ítróttarsambandið og um føroyskan ítrótt annars.

Tá ið stevnan var sett, mintust luttakararnir eisini tey átta, sum lótu lív í vanlukkunui á tónleikastenvni í Roskilde við tøgn í ein minutt.



*Anna Djurhuus er høvuðssamskipari í Suðuroy*

Hetta er triðju ferð at stevnan er, í fyrrárið var hon í Íslandi og í fjør var hon í Grønlandi og tað er Norðurlandaráðið, sum fíggjar ein part av henni.

Meðan tey eru í Føroyum, sleppa tey nógvar útferðir at síggja landið og ymsar merkisstaðir.

Tey sleppa eisini onkran gongutúr í fjøllunum, tey sleppa at dansa føroyskan dans og tey sleppa at royna seg í føroyskum kappróðrarbátum.

Men tað er eisini álvari á skránni. Tey skulu m.a. hoyra ein fyrilestur um ítróttarskaðar og tey skulu eisini arbeiða í bólkum, har hvør bólkur skal gera sínar metingar um, hvussu norðurlendska samstarvið kann mennast.

Men harumframt vóru eisini ríkiligt av møguleikum at íðka ítrótt, bæði í ítróttarhølini í Trongisvági og á graslíkinum á Sevmýri.

# Størri samstarv ímillum Føroyar og USA væl hugsandi á nógvum økjum

*– Økt samstarv ímillum Føroyar og USA er væl hugsandi á nógvum økjum, sigur Richard Swett, amerikanskur sendirharri í Danmark*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Eg kundi saktans hugsa mær, at tað kundi blivið sørri samstarv ímillum Føroyar og USA.

Sigur amerikanski sendiharrin í Danmark, Richard Swett, sum var í Føroyum í farnu viku saman við konu síni, Katrinu.

Tey vóru komin higar á kunningarferð, og á Føroyaferðini vóru tey bæði á fleiri útferðum, tey hoyrdu um søgu og søgn og tey hava vitjað ymsar mentanarstovnar. Men tey vóru eisini á á ymsum virkjum og stovnum, umframt at tey komu á tal við Landsstýrið.

Tey siga bæði, at tey eru ógvuliga hugtikin av landinum og fólkinum og tí gestablídni, sum teimum er víst á Føroyaferðini, og tey søgdu, at tey høvdu fingið nógv burturúr ferðini.

Serliga bilsin vóru tey av fiskivinnunu, sum tey hildu var í fremstu røð í heiminum og sum ekkaleys kundi taka kappingina upp við hvønn sum helst.

Sjálv koma tey úr einum stórum landi, men tey hildu, at tað hevur eisini stórar fyrimunir at koma úr einum lítlum landi. Tí í einum lítlum landi eru fólk noydd at hav eitt høgri kunnleikastøðið enn fólk hava fyri neyðuni at hava í einum stórum landi og hann ivaðist ikki í, at vanligi føroyingurin var nógv betri upplýstur um alskyns viðurskifti úti í heimi, enn vanligi amerikanarin er.

Tað er ógvuliga avmarkað, fyri ikki at siga onki, sum ein slíkur sendiharri kann loyva sær at siga um tey mál, sum leika á í Føroyum í dag, so tá ið hann varð spurdur um sjálvstýrissamráðingarnar og hervaldið í Føroyum, var hann lítið ítøkiligur.

Men hann segði kortini, at støðirnar í Føroyum høvdu havt stóran týdning undir kalda krígnum.

Men tað var av nú, og spurningurin um framtíðarhervald í Føroyum var ikki í hansara hondum.

Tó kundi hann saktans síggja fyri sær eitt økt samstarv ímillum Føroyar og USA á nógvum økjum. Tað kundi bæði verið í oljuvinnuni, í fiskivinnuni, telesamskifti og innan gransking og kanning, eitt nú innan fiskivinnu.

Men hann helt, at tað hevði stóran týdning ikki at leypa framav. Tað var betur at taka eina verkætlan í senn og fáa hana á føtur, áðrenn farið varð í holt við tað næsta. Hann helt eisini, at hvør einstak verkætlan kundi verið eitt stórt framstig fyri Føroyar.



*Richard Swett og konan, Katrina, vóru avbera væl nøgd við Føroyaferðina, ikki minst vóru tey hugtikin av, hvussu frammaliga fiskivinnan er*



# Uppskoti› frá Rás 2 vraka›

*Mentamálanevndin og Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar b‡rá› halda ikki, at verandi uppskot um samstarv frá Rás 2, er ein gongd lei›. Mentamálanevndin skal í sta›in gera eitt n‡tt útkast*

DIA MIDJORD

Rás 2 fær ikki mána›arstyrk á eina krónu fyri hvønn borgara, sum uppskoti› til avtalu vi› Tórshavnar kommunu leggir upp til. Hetta kom fram á fundinum mánakvøldi›, tá umbo› fyri Rás 2 vóru inni á teppinum hjá Mentamálanevndini og Fíggjarnevndini og greiddu frá útkastinum.

Samtykt var› á fundinum at beina máli› aftur í Mentamálanevndina. Hendan skal so gera nakrar karmar, hvussu eitt møguligt samstarv kann síggja út. Tórshavnar b‡rá› skal so á fundi 7. september taka stø›u til, um hetta skal gerast fuglur ella fiskur.

## Á jøvnum føti

Forma›urin í Mentamálanevndini Kaj Leo Johannesen hevur somu stø›u í dag, eftir at hann hevur hoyrt grundgevingina fyri eini avtalu frá Rás 2 umbo›unum.

– Vit kunnu ikki fara inn og stu›la einum ávísum fjølmi›li, tí í mínari ver› mugu øll hava somu treytir. Eg ivist heldur onga løtuna, at a›rir fjølmi›lar høvdu komi› á b‡rá›sfund, um hesir fingu 200 túsund krónur um ári›, sigur Kaj Leo Johannesen.

Forma›urin í Mentamálanevndini heldur bestu loysnina ver›a, at kommunan keypir tær tænastur, i› man metir brúk er fyri.

– Vilja vit kunna borgaran um eitthvørt, so keypa vit ein tíma í onkrum loftmi›li og gjalda fyri hesa tænastu. Lætt og einfalt, sigur Kaj Leo Johannesen, sum eins og allir hinir b‡rá›slimirnir heldur ta› ver›a skilagott vi› meiri kunning út til borgaran í kommununi.



*Mentamálanevndin og Fíggjarnevndin hjá Tórshavnar kommunu halda ikki, at uppskoti› frá Rás 2, í verandi líki, er bor›bart*

## Óttast ei

Leivur Hansen, forma›ur í fíggjarnevndini, heldur ta› ikki er rætt, at óttast eitt samstarv millum Rás 2 og b‡rá›i›. Hann hevur kunna› seg um slík vi›urskifti í grannalondunum.

– Hetta er vanligt í londunum kring okkum, og samstarvi› millum kommunu og loftmi›il riggar óføra væl, sigur Leivur Hansen, i› sjálvir er útbúgvin journalistur.

– Sjálvandi skal ikki vera talan um sokalla›an »skøkjujournalistikk«, har politikarar sleppa at gera sær dælt framman fyri opnari mikrofon. Hetta skal fyrst og fremst vera ein kunningartænasta til allar borgararnar í kommununi, sigur Leivur Hansen.

# Sløk hálv millión til útibarnagar›

*Arbei›i› upp á útibarnagar›in á Hvítanesi skal byrja beinanveg, so hesin er klárur eftir summarfrítí›ina*

DIA MIDJORD

Á eykab‡rá›sfundi mánakvøldi› var› einmælt samtykt at seta á stovn útibarnagar› á Hvítanesi. Útibarnagar›urin skal h‡sa 14 børnum og halda til í gamla skúlanum.

Á›renn børnini kunnu byrja í útibarnagar›inum á Hvítanesi, skal umvælast og byggjast aftrat fyri 473.000 krónur. M. a. skal gerast n‡ggjur køkur, og børnini skulu eisini hava n‡tt WC og klædnarúm.

Arbei›i› ver›ur byrja› sum skjótast, so klárt er at taka ímóti børnunum eftir summarfrítí›ina.

## Nevndin manna›

Fimm limir skulu manna nevndina í sjálvsognarstovninum »Berjabrekka 3«. Á eykab‡rá›sfundinum mánakvøldi› vór›u Leivur Hansen og He›in Mortensen valdir fyri b‡rá›i›. Húsalánsgrunnurin skal velja tveir limir, og so skulu tey f‡ra velja fimta limin.

Tórshavnar b‡rá› samtykti eisini á hesum fundinum at broyta regluger›ina fyri at søkja kommununa um grundstykki›. Eftir n‡ggju reglunum skalt tú vera 18 ár fyri at søkja um grundstykki›.



Lýsið í sosialinum

falbe
SUMMARJAKKAR OG KLÆDNINGAR





Sosialurin - 311820

Vælklæddir í klæðum frá Kissa

P/F hjá KISSA
Tórsgøta • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 95

